# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Barrack Obama eigur ikki at skammast av at vera avmyndaður í einum fremmandum klæðnabúna (starvsfólk hjá Hillary Clinton)*

# Obama í afrikonskum búna og við turban á høvdinum

**Amerikanska forsetavalstríðið er ikki bara orð longur. Nú verða onnur vápn tikin í brúk**

Viðhaldsfólk hjá Barrack Obama eru ikki í iva um, at tað er valbólkurin hjá Hillary Clinton, sum hevur almannakunngjørt myndina av Obama í afrikonskum búna og við turban á høvdinum. Men stravsfólkini hjá Hillary Clintion vísa skuldsetingini aftur.

Myndin av Barrack Obama er tikin har norðuri í Kenya fyri tveimum árum síðani, tá Obama var har og vitjaði síni skyldfólkini hjá pápa sínum, sum var ættaður úr Kenya.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at tað er eingin ivi um, at ætlanin við myndini er at órógva valstríðið hjá Barrack Obama, og at valstríð í USA hava fyrr víst, at tað er næstan einki mark fyri, hvørji vápn verða tikin fram, tá avgerðin nærkast.

- At Obama júst er avmyndaður í hasum búnanum og við turban á høvdinum er ein roynd at seta hann í samband við islam, sigur ein eygleiðari við NTB.

Barrack Obama gjørdi í gjár viðmerkingar til myndina av sær.

- Eg haldi ikki, at amerikanarar hava áhuga í tílíkum politikki, segði hann við eina útvarpsstøð í Texas.



*Barrack Obama og hansara viðhaldsfólk eru í øðini um myndina av senatorinum við turban á høvdinum*

## STUTT SAGT

### Medvedev og Putin samdir

Russiski varaforsætisráðharrin, Dmitrij Medvedev, sigur, at Russland tekur av fullum huga undir við Serbia og serbisku stjórnini í trætuni um Kosovo. Tað segði hann í gjár, tá hann var í Beograd og tosaði við Vojislav Kostunica, forsætisráðharra og Boris Tadic, forseta. Russiski varaforsætisráðharrin legði afturat, at avgerðini hjá Kosovo at loysa frá Serbia er ikki í samsvari við altjóða lógir og reglur. Hetta er tað sama, sum Vladimir Putin, forseti, hevur sagt, og tað kemur neyvan óvart á nakran, at teir báðir eru samdir, tí Putin hevur mælt russum til at velja Medvedev til sín eftirmann.

### Kekkar skriva undir

Samráðingarnar um at seta eina amerikanska radarastøð upp í Kekkia eru komnar so væl áleiðis, at sambært kekkisku stjórnini er klárt at skriva undir avtaluna í næstu viku. Tá fer kekkiski forsætisráðharrin, Mirek Topolanek, til Washington at vitja, og har ætlar hann at skriva undir avtaluna saman við George W. Bush, forseta, skrivarAP. Kekkiski forsætisráðharrin gjørdi tó greitt í gjár, at avtalan verður ikki sett í verk, fyrr enn USA og Pólland eru vorðin samd um, at USA kann seta rakettir upp í Póllandi.

### Kunnu veiða fíl

Tey seinastu trettan árini hevur tað verið bannað at veiða fíl í Suðurafrika, men nú umhugsa myndugleikarnir har at loyva veiðimonnum at veiða nakrar fílar. Í 1995 vóru 8.000 fílar í Suðurafrika, men í dag eru teir umleið 20.000 í tali. Hertta hevur havt við sær, at fílurin er vorðin næskur, og tað hendir meiri enn so, at teir gera seg inn á fólk. Tí halda myndugleikarnir tað vera rætt at veiða eitt sindur burtur av stovninum, skrivar Reuters.

## Sleppur undan ákæru

Ísraelski hægstirættur staðfesti fyrrapartin eina avtalu, sum ger, at fyrrverandi forsetin Moshe Katsev sleppur undan einari ákæru um neyðtøku. Katsev noyddist at siga forsetaembætið frá sær seinasta summar, tá hann bleiv skuldsettur fyri neyðtøku og annan kynsligan ágang. Tað eydnaðist honum kortini at fáa eina avtalu við ákæruvaldið, sum hægstirættur nú hevur staðfest. Kvinnufelagsskapir í Ísrael eru í øðini um, at fyrrverandi forsetin sleppur undan ákæru.

# Dýrar matvørur og vantandi stuðul noyða ST at skamta

**Skal matvøruhjálpin hjá ST hjálpa teimum, sum hava hjálp fyri neyðini, má stovnurin fáa meiri pengar**

Afghanistan er eitt av londunum, har fólk hava tørv á hjálp fyri at fáa nóg mikið av mati í munnin, sigur stjórin á matvørustovninum hjá ST, Josette Sheeran. Hon vísir á, at orsakað av veksandi eftirspurningi á heimsmarknaðinum hækkaði matvøruprísurin í Afghanistan 40 prosent í fjør, og tað hevur gjørt matin so dýran, at fólk har hava ikki ráð at keypa hann. Tí mugu tey fáa hjálp, sigur Josette Sheeran við BBC.




*World Food Programmme hevur brúk fyri fleiri pengum, um stovnurin skal metta tey mongu, sum hava tørv á hjálp*
*Mynd: AP*

- Verður matvøruprísurin tvífaldaður, kunnu vit bara lata helmingin meiri, og tí fer verður neyðugt við størri stuðuli, um vit skulu mnøkta tørvin hjá teimum, sum hava hjálpina fyri neyðini, sigur WFP-stjórin.

- Nógvastaðni hava fólk einki at líta á uttan mat frá okkum, sigur hon.

ST-landbúnaðarstovnurin FAO segði fyri nøkrum vikum síðani, at prísurin á hveiti og øðrum kornsløgum er hækkaður so nógv, at tað kann elva til eina heimsumfatandi avbjóðing. FAO hevur roknað út, at yvirhøvur noyðast tey fátæku londini at brúka ein triðing meiri til kornkeyp í ár enn í fjør, og at í Afrika verður meirútreiðslan heili 49 prosent.